# Jólasølan hjá Heimavirkisfelagnum

JÓLASØLA
*Ingrid Bjarnastein*

Aftur í ár skipar Føroya Heimavirkisfelag fyri tí afturvendandi jólasøluni. Hon verður í Badmintonhøllini leygardagin 1. og sunnudagin 2. desember.

Føroya Heimavirkisfelag hevur limir runt í øllum Føroyum, bæði kvinnur og menn, ung sum gomul. Ein og hvør kann vera limur í felagnum.

Á jólasøluni fara umleið 32 einstaklingar at hava básar. Her verður alt møguligt at fáa til keyps, og eru allir lutirnir virkaðir í Føroyum – teir flestu við hond. Uttan iva verða nógvar jólagávur seldar á jólasøluni, tí har kanst tú fáa útklipp, dekoratiónir, lutir úr gandadeiggi, barnaklæðir, troyggjur, húgvur, nissur og annað - jólaprýði ella ikki.

Frá Heimavirkisfelagnum siga tey, at sølan er ógvuliga væl dámd, og plagar tað at verða eitt ógvuliga hugnaligt tiltak. Nógv fólk vitja á hvørjum ári jólasøluna.



Í Badmintonhøllini fer eisini at vera ein café, sum fer at selja kaffi, te, smyrjibreyð við føroyskum viðskera, køkur, rís a la mande og annað gott, so fólk ikki ganga svang og hyggja eftir lutunum.

Jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag letur upp leygarmorgunin klokkan 10 og letur aftur klokkan 20.00. Sunnudagin er opið frá klokkan 14–19.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið veksur hann vindin av útsynningi. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og stundum regn.Út á seinnapartin minni vindur og bert okkurt ælið. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og møguliga regn eitt skifti, annars sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Upp í ein strúk av suðri og regn ella vátakavi, men mánadagin minni vindur av útsynningi og okkurt ælið. Hitin millum frostmarkið og 4 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷17 |
| Nuuk | ÷9 |
| Qaqortoq | ÷8 |
| Ammassalik | ÷12 |
| Saint John's | 6 |
| Halifax | 9 |
| Reykjavík | ÷2 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 8 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | ÷2 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 15 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 13 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 981 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing eystan og dýpist.




Eitt djúpt lágtrýst í landnyrðing úr Íslandi hvørvur í ein norðan, meðan eitt annað lágtrýst yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/11 kl. 06[00]– 28/11 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 3,6°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 27/11 kl. 06[00]– 28/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 148,0 mm









## VESTFALLSKYRRINDI

22. nov.: Fyrra kvarter
23. nov.: Mánin longst frá jørðini
30. nov.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. nov | 05.04 | 17.26 | 04.04 | 16.26 | 04.19 | 16.41 | 07.04 | 19.26 | 08.04 | 20.26 | 03.19 | 15.41 | 02.19 | 14.41 | 05.19 | 17.41 | 06.19 | 18.41 | 04.49 | 17.11 | 06.04 | 18.26 |
| 30. nov | 05.48 | 18.09 | 04.48 | 17.09 | 05.03 | 17.24 | 07.48 | 20.09 | 08.48 | 21.09 | 04.03 | 16.24 | 03.03 | 15.24 | 06.03 | 18.24 | 07.03 | 19.24 | 05.33 | 17.54 | 06.48 | 19.09 |
| 1. des | 06.30 | 18.55 | 05.30 | 17.55 | 05.45 | 18.10 | 08.30 | 20.55 | 09.30 | 21.55 | 04.45 | 17.10 | 03.45 | 16.10 | 06.45 | 19.10 | 07.45 | 20.10 | 06.15 | 18.40 | 07.30 | 19.55 |
| 2. des | 07.20 | 19.47 | 06.20 | 18.47 | 06.35 | 19.02 | 09.20 | 21.47 | 10.20 | 22.47 | 05.35 | 18.02 | 04.35 | 17.02 | 07.35 | 20.02 | 08.35 | 21.02 | 07.05 | 19.32 | 08.20 | 20.47 |

5 707265 100043 >